Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 11. august 2006



## Søgan um eitt-talið
DR2

Úr sumerisku siðmentanini í Irak til Egyptalands og síðan til støddfrøðisskúlan hjá grikska stórmenninum Pythagora. Indar funnu uppá hitt lítla runda nullið og teir kundu soleiðis, við eini snøggari talrøð, skriva óendalig stór tøl. Og tað var arabiski heimurin, sum tók tey indisku tølini til sín - og tí kalla vit í dag okkara talskipan fyri arabaratøl. Terry Jones fortelur søguna um eitt-talið.

**Sunnudag 13. kl. 21.50**





## The Interrogation of Michael Crowe

12 ára gamla Stephanie Crowe verður funnin myrd á kamarið sínum. Meðan foreldrini syrgja dóttrina, leitar løgreglan eftir mordaranum. Illgruni er til Michael, 14 ára gamla stóribeiggja Stephanie. Løgreglan ger alt fyri finna prógva, at hann drap systrina og at enda eydnast teimum at noyða hann at játta seg sekan. Men hevur Michael dripið systrina, ella er hann offur fyri einum órættvísum dómi? Amr. filmur frá 2002 grundaður á veruligar hendingar.

**Fríggjadag 4. kl. 00.25**

## Carambole
CANAL+

Pieter Clausen lækni rennur burtur frá eini deyðsvanlukku, sum hann sjálvur var orsøk til. Men onkur annar var eisini á vanlukkustaðnum, sum Clausen ikki visti av og sum sá tilburðin. Nú noyðir viðkomandi pening burturúr læknanum. Clausen drepir avnoyðaran, men kanska er tann skeivi maðurin, sum hann drepir? Svenskur krimifilmur frá 2005 við Sven Wollter í høvuðsleikluttinum.

**Hósdag 17. kl. 19.20**

Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**